Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Annika Olsen, løgtingskvinna

Svarari: Djóni Nolsøe Joensen, landsstýrismaður í barna- og útbúgvingarmálum

Evni: Meritútbúgving innan námsfrøði í Føroyum

Spurningar:

1. Verður arbeitt við at skipa eina meritútbúgving fyri námsfrøðingar (professiónsbachelor) í Føroyum?
2. Um ja, nær og hvussu er ætlanin at skipa hetta ?

Viðmerkingar:
Sambært Búskaparráðnum, so fara tað at mangla 700 starvfók innan heilsu- og umsorganarøkið og dagstovnaøkið tey komandi 10 árini. Tí eiga vit at skipa okkara útbúgvaringarskipan soleiðis, at vit megna at lofta komandi avbjóðingum.

Dagstovnalógin sigur, at tað skulu vera 2/3 námsfrøðingar, sum skulu arbeiða á dagstovnaøkinum, men støðan er tann, at vit sum samfelag langt frá halda hesa lógaráseting, og hóast fleiri flokkar eru raðfestir á námsfrøðiligu útbúgvingini á Fróðskaparsetrinum, so røkka vit framvegis ikki málinum.

Ásannandi hesa avbjóðing fór Tórshavnar kommuna tískil undir eina meritútbúgving í Danmark í februar í ár, har starvfólk innan dagstovnaøkið kunnu fara til Danmarkar at fáa eina meritútbúgving, sum er, at tær royndir, tú hevði gjørt tær á dagstovnaøkinum, kundu teljast við í tína útbúgving. Talan er um eina sokallaða professiónsbachelor, ið telur 160 ECTS stig og tekur 3,5 ár, ella 7 semestur. Ímeðan tú lesur skalt tú 2 ferðir í starvsvenjing hvørt semestur og fært løn, meðan tú tekur útbúgvingina, tó ikki meðan tú ert í skúla. Tú kanst taka útbúgvingina á netinum, og skalt bert til Danmarkar í eina viku í byrjanini og í endanum av einum semestri.

Tað vóru 21 persónar, sum byrjaðu at taka hesa útbúgving í februar í ár, og væntandi verða tað 25 persónar, ið verða tiknir upp komandi ár. Sum samfelag eiga vit tó at skipa okkara útbúgvingar soleiðis, at vit í størsta mun kunnu taka hesar útbúgvingar í Føroyum, heldur enn at verða noydd at senda fólk av landinum. Hesa meritútbúgving/profesissiónsbachelor hevði verið upplagt, at vit kundu skipa í Føroyum og tí verða hesir spurningar settir landsstýrismanninum.

Á Løgtingi, 13. september 2024

Annika Olsen